




# Fyrsti sigurin í Klaksvík í níggju ár



**10–mannafør: Fyri góðum tveimum vikum síðani breyt ein maður armin, og so kundi Havnarbáturin ikki luttaka í róðrinum á Strondum**

Tá teir sunnudagin undan hvítusunnu hildu bygdarstevnu á Strondum, vann Vestmenningur kappróðurin millum 10–mannaførini. Ta ferðina sást einki til Havnarbátin, sum vann á norðoyarstevnu. Onkur helt fyri, at havnarmenn høvdu goymt seg, so teir betri kundu kløkka hinar, men soleiðis siga teir ikki sjálvir:

– Í vikuni undan róðrinum á Strondum mistu vit ein mann. Eftir venjingina spældu vit fótbólt, og tá var tað so óheppið, at Jens Christian Dam breyt armin. Tí var neyðugt at finna ein nýggjan mann. Nýggi maðurin hevði róð við okkum í fjør, men tað kendist sjálvandi ikki optimalt, at vit bara høvdu vant saman í tíggju dagar, tá vit fóru á norðoyastevnu.

Tað er Magni Brøðraberg, sum vit hava í telefonini. Hann er bátsformaður á Havnarbátinum, sum fyri fyrstu ferð síðani 1992 vann kappróðurin á norðoyarstevnu:

– Tú kanst ætla, at tað lætnaði. Vit vóru einasti báturin úr høvuðsstaðnum, sum vann í Klaksvík.

Manningin á Havnarbátinum hevur nógvar royndir. Teir vunnu FM við Ørvi í fyrraárið. Ì fjør royndu teir seg við Havnarbátinum, og nú tykjast teir rættuliga at hava tak á tí. Manningin er ímillum 21 og 33 ár. Jógvan Jacobsen er stýrimaður, og so eru hinir frameftir: Jógvan Clementsen, Regin Thomsen, Magni Brøðraberg, Marius Joensen, Mayfinn Norðoy, Jógvan Lützen, Skarpheðinn Njálson, Ingi á Torgarði, Halgir Dahl Olsen og Óli Svein Hansen.

Tað kann ikki sigast annað, enn at hugurin at rógva og venja er góður. Eitt gott dømi um hetta er Ingi á Torgarði. Hann býr og arbeiðir í Fuglafirði, men fimm ferðir um vikuna koyrir hann til Havnar at venja!

## Stór kapping

Umborð á Havnarbátinum høvdu teir vónað, at teir skuldu vinna, men teir vistu, at tað fór at vera tætt.

– Í sjálvum startinum var Eysturoyingur fremstur. Vit vóru javnir við Vestmenningin og lógu ein skut aftanfyri Eysturoyingin. Tá vit komu framvið Kósabrúnni gekk tað væl hjá okkum. Eina løtu vóru vit leysir av hinum og kanska gott og væl, men so hótti Vestmenningur okkum rættuliga. Tað gekk ein løta, eftir at vit vóru komnir á mál, áðrenn vit fingu at vita, at vit høvdu vunnið, so tú kanst ætla, at tað lætnaði, sigur Magni Brøðraberg.

Bátsformaðurin á Havnarbátinum roknar við stórari kapping í summar, og róðurin í Klaksvík gav ábendingar um hetta. Vestmenningar tykjast vera væl fyri, men teir vóru ov seinir at fáa bátin upp í ferð. Teir høvdu ein framúr sluttspurt, men teir megnaðu ikki at taka Havnarbátin.

Spurningurin er, hvussu tað verður við Eysturoyinginum. Vit hava skilt, at teir hava ikki vant so leingi sum hinir. Leygardagin sást, at teir ikki enn eru í somu venjing sum hinir, men tað fer at javna seg. Nólsoyingurin gjørdi ikki so nógv um seg hesa ferð, men teir eru altíð vandamiklir.

# Vaksnir menn verja stoltleikan

**8–mannafør: Ikki síðani 1970 hevur tað verið so lætt at drigið ein klaksvíksbát, sum tað leygardagin var at fáa Nevið Reyða upp á turt**

Kappróður er ikki bara fyri blaðungar og lættar menn. Tað varð leygardagin rudduliga staðfest í Klaksvík. Miðalvektin á teimum umborð á Nevinum Reyða liggur um 160 pund, og teir eru ikki ársungar. Á toftini sita brøðurnir Sigfríður og Martin Venned. Tann fyrri er 37 ára gamal, og hin er 34. Hinir eru eisini í róðrarhøpi rættuliga tilkomnir. Stýrimaðurin, Bogi Joensen, er 28, á lærinum sita 28 ára gamli Fróði Waag og 30 ára gamli John Erik Frederiksberg, í rúminum eru 23 ára gamli Símun Esmar Vágsá og 28 ára gamli Hans Olsen, og á bógbekki eru 27 ára gamli Høgni Jacobsen og 30 ára gamli Livir Nysted.

Tilkomnir klaksvíkingar minnast, at tá spildurnýggi Klaksvíkingurin í 1970 vann norðoyarstevnuróðurin, so varð báturin borin av kátum viðhaldsfólkum. Síðani tá hava úrslitini verið minni góð, og róðrarfólkið hevur drigið bátarnar.

– Eg havi verið við síðani fyrst í níti árunum. Ongantíð áður havi eg hugt upp í luftina fyri at síggja bátin, men soleiðis var tað, tá vit skuldu fáa bátin upp á land leygardagin. Vit sluppu ikki framat at draga, og tað haldi eg sjálvsagt var stuttligt.

Hetta sigur Fróði Waag, sum umframt at rógva eisini er nevndarlimur í Klaksvíkar Róðrarfelag. Eftirnavnið bendir á Føroya Bjór, og bryggjaríið í Klaksvík er væl umboðað umborð á Nevinum Reyða. Ikki færri enn seks av teimum níggju arbeiða á Føroya Bjór!

## Tað verður tætt

Allir umborð á Nevinum Reyða róðu eisini í fjør. Tá illneitaðust teir fleiri ferðir inn á seg sjálvar, tí teir eftir góðan start duttu afturav. Teir hildu seg fleiri ferðir ganga burtur frá tí, sum teir frammanundan høvdu avtalað.

– Hesa ferð var eingin trupulleiki. Men høvuðsorsøkin var tann, at vit í ár eru so nógv betri fyri, enn vit vóru í fjør, heldur Fróði Waag.

Hann sigur eisini, at teir kendu seg vera væl við, tá tey tredivu tøkini í startspurtinum vóru tikin, og tá teir róðu framvið Kósabrúnni, kendu teir seg vísar í at vinna:

– Tað var besta kenslan, sum vit nakrantíð hava havt í kappróðri, at vit í heimasjógvi so at siga kundu njóta sigurin saman við hinum klaksvíkingunum.

Nevið Reyða var gott og væl leyst av hinum bátunum, tá teir komu á mál. Men umborð á Nevinum roknar teir við stórari kapping frá spildurnýggja Knørri.

– Eg rokni við, at vit hava vant meiri enn teir, so tað verður ivaleyst spennandi í summar. Teir umborð á Knørri eru allir royndir rógvarar, og teir vilja sjálvandi vinna við nýggja bátinum. Argjabáturin og Kvívíkingurin eru altíð vandamiklir, so vit mugu rættuliga spíla okkum út. Men sigurin á norðoyarstevnu kann eingin taka frá okkum, staðfestir Fróði Waag.